# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

22. desember fingu Guri Jacobsen og Mads Hollensen, Holbæk, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3250 gr.

24. desember fingu Anna og Símin Pauli Sivertsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3500 gr.

29. desember fingu Paula Ólavsdóttir og Albin Johannessen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4030 gr.

1. januar fingu kristbjørg Lagfoss og Hans Pauli Sørensen, Porkeri, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3420 gr.

3. januar fingu Lis og Jóhan í Niðristovu, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3700 gr.



*26. desember fekk eg hesa fittu lítlusystir á Hvidovre Hospital. Mamma mín eitur Irdi og pápi mín eitur Valbjørn. Vit búgva á Amager í Keypmannahavn.*



*Hey! Vit eita Julian og Sólrun og 4. januar fingu vit eina lítlasystur, sum eitur Fríða. Hon var 54 cm long og vigaði 3800 gr. Foreldur okkara eru Ingrid Hayfild og Martin Eysturdal og vit búgva í Klaksvík.*

7. januar fingu Marjun Wilhelm og Ólavur Brimnes, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4750 gr.

7. januar fingu Marita Kret Tausen og Erland Joensen, Norðdepli, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

8. januar fingu Unn Jakobsen og Rúni Abrahamsen, Tórshavn, tvíburar, dreingir. Annar var 52 cm langur og vigaði 2960 gr, hin 51 cm langur og vigaði 2960 gr.

8. januar fingu Oddvør Joensen, Kollafirði, og Sunnleif Olsen, Hósvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2890 gr.

8. januar fingu Maibritt og Ken Bærentsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2600 gr.

8. januar fingu Monika og Timothy Sharp, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3250 gr. Hon eitur Ragnhild Kunoy Sharp.

9. januar fingu Tina Rasmussen og Bogi Rasmussen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

9. januar fingu Oddvá og Janus Fossdalsá, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3135 gr.

9. januar fingu Marjun og Samson í Lambanum, Fuglafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3850 gr.

10. januar fingu Guðbjørg á Lofti og Fríði M. Petersen, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

10. januar fingu Annelisa og Dan Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3550 gr.

10. januar fingu Óluva Poulsen og Ólavur Rasmussen eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

12. januar fingu Kristfríð A. Justesen og Símun Jóhannus Mikkelsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4480 gr.

15. januar fingu Beinta og Regin Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3775 gr.

# Til Ingigerð á 60 ára degnum 18. januar 2004



Tú 60 ár? Tað ber ikki til. Jú, eg veit væl, at vit ganga ikki svartklødd sum fyrr, og síggja tí ikki so gomul út, men tú hevur harafturat varðveitt ljósið í eygunum, og haðan stavar stóri munurin. Meðan onnur hava sløkt hetta ljósið langt áðrenn tey koma til tey fjøruti, lýsir tú enn bjart av eldhuga, gerandisgleði og blíðskapi. Tað heldur teg unga og vakra. Altíð fús við góðum hugskotum, altíð til reiðar til góðar felags loysnir saman við mótfólkum, aldrin fordómsfull, altíð hjálpsom og hugað at greiða frá.

Og hvør annar í verðini hevur eina Kunningarstovu sum tína, har tú handan diskin gevur viðskiftafólkunum alla ta hugsavnan tú megnar, ta løtuna, samskiftið varir? Hetta er ein serlig gáva at eiga, og mong eru tey ferðafólk, ið gjøgnum ár og dag hava fingið eitt gott ferðaminni heim við sær, bara tí tey komu á gátt hjá tær eina løtu at spyrja um eitthvørt smávegis. Øll fóru tey útaftur við eini fatan av, at føroyingurin er beinasamur. At skapa "ta avgerandi løtu" fellur bara natúrligt hjá tær.

Báðar eru vit ferðaleiðarar og okkum dámar fremmandafólk. Kanska er tað okkurt við abba'sa arvaeginleikum, ið trínur fram? Tað var jú hann, Johan Shell, sum á sinni rópti - einaferð Hetlendingar spældu landsdyst her, men fingu ikki mál - "Gev teimum nú eitt mál fyri blíðskaps skyld"! Og útferðum skipaði hann eisini fegin fyri. Hvør minnist ikki filmin, tú vísti fyri nøkrum árum síðani av monnunum í Undirhúsinum, sum í 50'unum fóru útferð við Gamla Streymi? Allar hesar spentu, gomlu havnarmennirnar í klædningi, við frakka um armin og abba mitt í rokinum?

Vit eru døtur av "ektaðum" havnarmonnum, sum høvdu foreldur, ið eisini vóru barnvaksin her. Pápar okkara fingu sær báðir konu sunnaneftir, mín úr Lítla Danmark og tín úr Stóra Danmark. Frá teimum komu vit havnarkonur við akkersfesti í Havnar býi, kærleika til og stoltleika um okkara heimstað, men samstundis eini trongd at venda úteftir og breiða armarnar út fyri landsins gestum.

Saman við gongufólkunum í Felagnum Tórshavn hava vit seinastu árini upplivað føroysku náttúruna sum eyðmjúkir gestir. Vit hava fylgst um fjøll og dalar, gingið fram við áum og gjáum, hvílt við vøtn og tjarnir, leitað upp fransatoftir og sjáldamt sillagrót, sungið tjóðsangin saman í avtoftaðum bygdum, gingið gamlar bygdagøtur í logandi morgunroða á náttartúrum, vitjað virkir og kirkjur, sæð urtagarðar og gamlar varðar. Minnini eru livandi og óteljandi. Eisini Havnartúrarnir hava verið minniligir. Minnist tú, tá vit stóðu allarovast í torninum á Vesturkirkjuni, ella hinaferð, teir heysaðu teg upp undir stjørnuhimmalin í hægsta brandbilastiganum undir Varða, tá vit vóru til rundvísing har?

Tú ert sjálv ein stjørna. Tað var tú, sum gjørdi mín dreym til veruleika. Dreymin um at hava havt alt Føroyaland undir fótum í felagsskapi við øðrum hugagóðum havnarfólki. Hetta hava vit nú gjørt í meira enn 10 ár, og í sinnunum eiga vit nú eina endaleys røð hugfarsligum hugans myndum, ið ongantíð kunnu takast frá okkum aftur, so leingi vit eru andsfrískar.

Orðini niðanfyri komu úr penninum undir einum skeiðið í enskum fyri nøkrum árum síðani. Eg veit ikki hvat eg skal gera við tey, so nú gevi eg tær tey í føðingardagsgávu frá mær, við eini djúpari tøkk fyri, at tú gjørdi so nógv í mínum vaksna lívi.

Behold my country - the Faroe Islands - eighteen beauties playfully swimming in the North Atlantic. Splashing water at each other or just peacefully floating in the midday sun, they occasionally dive, then suddenly emerge again, the salty seawater washing their beautiful bodies, their hair rythmically waving back and forth, back and forth. I was born in this country some fifty years ago and have lived all my life with these beauties, never leaving them for more than a few weeks at a time. They are all my mothers and I am their adopted, affectionate child. They cradled me, they cuddled me, they carried me. I know every inch of their skin, every scar, every hollow - and every wrinkle they gathered from smiling lovingly at me, their child. Sometimes they cry and the tears come rushing down their faces, but the sadness soon passes away and contentment shows itself in the freshness of their pastures where God's lambs graze in peace.

Okkara land. Takk fyri, góða Diddan, og hjartaliga tillukku við degnum.

**Systkinabarnið í Havn**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Inga og Jákup Haraldsen gullbrúdleyp



Leygardagin 11. januar 2004 kundu hjúnini Inga og Jákup Haraldsen í Havn halda gullbrúdleyp.

Inga er fødd á Skála í 1932, dóttir Mariu, f. Magnussen, úr Saksun, og Dánjal Paula Jacobsen, úr Gøtu. Tey búðu á Skála og høvdu skipasmiðjuna har. Sum átta ára gomul flutti hon til Havnar og búði Hoydølum.

Hon er útbúgvin defektrisa og hevur arbeitt á Apotekinum í Havn.

Jákup er vestmenningur, føddur í 1923, sonur Magdalenu, f. Jacobsen, úr Mykinesi, og Aksel Haraldsen, snikkarameistara, ættaður úr Sandavági.

Jákup tók studentsprógv á Sorø og lærdi til farmaceut. Í 1950 fekk hann starv sum farmaceutur í Havn, og fyrst í 70-unum bleiv hann settur sum landsapotekari. Hetta starv røkti hann til 1993, tá hann legði frá sær, 70 ára gamal.

Jákup hevur verið virkin í dansifelagnum í Havn og skipaði t.d. fyri barnadansi í Havn í 50-unum. Hann hevur altíð havt áhuga fyri náttúruni og gingið á fjall í Saksun og í Hoyvík, skotið harur og verið til útróðrar.

Saman hava tey gingið nógvar túrar og vitjað forkunnug støð, bæði í Føroyum og uttanlands.

Seinnu tíðina sum landsapotekari var Jákup við til at smíða núverandi lógirnar fyri apoteksverkið, og eftir at hann fór frá sum landsapotekari, var hann ráðgevi hjá Árna Dahl, sum skrivaði bókina um føroyska apoteksverkið.

Inga og Jákup eiga trý børn: Tóru, sum býr í Danmark, og Dánjal Paula og Aksel, sum búgva í Havn. Eisini eiga tey 9 ommu- og abbabørn.

Anne von Glasow:

## Nýggjur stjóri hjá Mærsk Air



1. februar 2004 fær kreppurakta flogfelagið, Maersk Air, nýggjan kommersiellan stjóra. Talan verður um 49 ára gomlu Anne von Glasow, sum kemur frá einum starvi sum sølustjóri hjá flogfelagnum KLM.

Anne von Glasow er útbúgvin løgfrøðingur og hevur fyrr verið í leiðandi starvi hjá SAS.

Við árs byrjan tók Finn Ylelund við sum fyrsitingarstjóri hjá Maersk Air. Hann er 53 ára gamal og kom frá einum líknandi starvi hjá Air Greenland. Eisini hann hevur eina fortíð hjá SAS.

Við Finn Ylelund á odda og Anne von Glasow sum kommersiellum stjóra hevur Maersk Air av nýggjum fingið eina professionella leiðslu sum eigararnir av flogfelagnum, A.P. Møller og Mærsk, geva sín fulla uppbakning, verður sagt í tíðindaskrivi.

*Kelda: TRAVEL PEOPLE Newsletter*

## Ingigerð á Trøðni 60 ár

Sunnudagin 18. januar fyllir Ingigerð á Trøðni í Havn 60 ár. Ingigerð er fødd á Frederiksberg, dóttir Karen, f. Olsen, úr Helsingør, og Heina á Trøðni úr Havn.

Eftir lokið studentsprógv tók hon lærarapróg v á Københavns Dag- og Aften Seminarium í 1969. Hon var lærari í Hvidovre frá 1966-70. Frá 1970-85 var hon lærari á venjingarskúlanum í Havn, samstundis sum hon undirvísti á Føroya Handilsskúla frá 1975-85.

Í 1983/84 var hon á árskeiði á Fróðskaparsetri Føroya við serligum denti á siðsøgu og enskt. Saman við Marionnu Simonsen hevur hon greitt úr hondum lærubókina Maskinskriving I .

Síðan 1985 hevur Ingigerð verið stjóri á Kunningarstovuni í Havn. Eitt av hennara hjartamálum er gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn, sum hon saman við øðrum var við til at stovna í 1993. Tey skipa fyri gongutúrum í Føroyum og nú eisini í Hetlandi um summari. Hon er eisini ferðaleiðari á gongutúrum, eitt nú í gomlu Havnini.

Hon er virkin í felagsskapinum Inner Wheel, sum er ein grein av Rotaryklubbinum.

Ingigerð er gift við Kjartani Kristiansen, úr Havn, tey eiga tvær døtur: Kristinu, sum er gift og býr í Odense og eigur børnini Sunnivu, Kjartan og Selmu, og Sissal sum býr í Havn.





MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Dagurin

**17. januar. Antonius**, róptur hin Mikli. Føddur í Herakles í Egyptalandi umleið ár 250. Býtti allar ognir sínar út millum tey fátæku og livdi síðan sum einbúgvi í oyðimørkini, men stóð í brævaskifti við mætar kirkjumenn og gjørdi eisini vart við seg í stríðinum um ta kristnu kirkjulæruna, sum Arius íbirti. Antonius doyði í 356.

Grikska navnið merkir *hin blómandi.*

**18. januar. Prisca**. ung genta, sum einaferð í 3. øld verður hálshøgd fyri trúar sakir.

*Gomul jól enda*, tá ið jóladagur er 6. januar eftir julianska kalendaranum. Dagurin verður eisini róptur *gamli trettandi.* Vilt tú verða ríkur, skal tú gomlu trettandu nátt ganga út og sita á kjørbreyt.

*Magnus Heinason bleiv hálshøgdur hendan dagin í 1589.*

**19. januar. Pontianus**. Úr Spoleto í Italiu. Doyði umleið ár 160 fyri trúgv sína.

*Gamli Knútur hertogi* er eftir julianska kalendaranum sami sum nevndur er 7. januar. *Kyndilsmessuknútur* sipar til gamlar danskar veðurspádómar á hesum degi.

Í Føroyum varð sagt:

*Sum veðrið er kyndilsmessuknút*
*skal tað vera kyndilsmessu út.*

## Andlát

10. januar
Hedvig Haraldsen, Sørvágur, 86 ár.

11. januar
Omi Hansen, ættað úr Æðuvík, búsitandi í Vestmanna, 75 ár.
Sigrid Grástein, búsitandi í Fredricia, ættað úr Kunoy, 67 ár.

12. januar
Jonnie Poulsen, Sandavágur, 64 ár.

13. januar
Marita Gullstein,Rituvík, ættað úr Skúvoy, 73 ár.

14. januar
Dorthea Danielsen, Strendur, 92 ár.